**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 20. september kunnu hjúnini Rigmor og Moody Olsson halda gullbrúdleyp. Tey, ið ynskja at heilsa uppá gullbrúðarparið, eru hjartaliga vælkomin millum kl. 9 og 18 á Heygsmannavegi 2 í Tórshavn.

**Brúdleyp**
Maibrit og John Marni Forná giftast leygardagin 27. september í Keypmannahavn. Adressan er: Lergravsvej 52, 1. t.v., 2300 København S.

**90 ára føðingardagur**
Týsdagin 23. september fyllir Anna Jacobsen, Hoyvíksvegur 31, Tórshavn 90 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 20. sept frá kl. 10-16. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**90 ára føðingardagur**
Mikudagin 24. september fyllir Poli Jacobsen, Miðvágur, 90 ár. Dagurin verður hildin á Ellisheiminum á Sýnini frá kl. 16-19.

**85 ára føðingardagur**
Josva Anthoniussen fyllur 85 ár sunnudagin. Hann er burturstaddur.

**80 ára føðingardagur**
Týsdagin 23. september fyllir Jóan Pauli Johannesen, vanliga nevndur Palli í Jákupsstovu, Vestmanna, 80 ár. Føðingardagurin verður hildin ið Miðhøllini í Vestmanna skúla sunnudagin 21. september frá kl. 16-20.

**75 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 19. sept. fyllir Hans Andreas Lamhauge, snikkari, Glyvrar 75 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**60 ára føðingardagur**
Leygardagin 25.oktober verður Thordis Skaalum, Sørvágur 60 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Miðvági 25. oktober kl. 19.00. Tey, ið vilja verða við til at gleða meg og gera dagin hugnaligan, vinarliga ringi til tlf. 333119 ella 227216 í seinasta lagi 10.oktober. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**50 og 55 ár**
Leygardagin 11. oktober kl. 19.00 halda Hervør og Dánial Jákup Jørgensen úr Miðvági 50 og 55 ára føðingardag. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Miðvági. Tey, ið vilja gleða okkum okkum við at koma, verða biðin um at siga frá innan 27. september á telefon 33 32 04 og 22 96 04 ella á telduposti: herdan@post.olivant.fo

**Konfirmantar í Fuglafjarðar kirkju 21. september:**
***Úr Fuglafirði:***
Jákup Jákupsson Eliassen, Leitisvegur 30,
Hjørtur á Fløtti, Sevdalsvegur 13,
Margeir Toftegaard, Kirkjuvegur 3,
Sigmundur Vang, Vestur í Bø 7,
Sunniva Fríða Berg, Norður í Gerði 19 ***(frá kl.17.00 verður dagurin hildin í Mentanarhúsinum)***,
Elin Johansdóttir Larsen, Toftagøta 12,
Durita Kallsoy Róin, Sevdalsvegur 3.

***Úr Leirvík:***
Renata Jensen, Áargarður 4.

**Konfirmatión í Vágs kirkju 5. oktober kl. 11.**
Kjartan Sverri Svenningsson Kjærbæk, Vágur
Brandur Magnussen Suðuroy, Vágur
Bartal Brattaberg Evaldsson, Vágur
Leivur Hammer, Hov
Ragnar Bárá Tausen, Porkeri
Magnus Herdalur, Vágur (Festen holdes i Famjin)
Jón Ljósstein Muller, Vágur
Oddur Joensen, Vágur
Sofus Bech, Porkeri
Niels Bergur Nolsøe, Vágur
Helena Strøm Sævarsdóttir, Vágur
Eir Arnfríð Magnusdóttir Veihe, Porkeri
Bára Mørk Poulsen, Vágur
Kára Jacobsen, Sumba
Hanna Ryggshamar Nysted, Vágur
Diana Joensen, Vágur
Anna Katrina Á Løðhamri, Vágur
Krista Óluva Birgisdóttir Beck, Vágur
Lóa Mikkelsen, Vágur
Fríða Mikkelsen, Vágur
Birita Joensen, Vágur
Rannvá Kristina Bertholdsen Dalá, Vágur
Sunnvá Merrý Bertholdsen Dalá, Vágur

## Trivnaðarleiðari til Eysturkommunu




Spennandi og fjølbroytt starv sum trivnaðarleiðari í Eysturkommunu er leyst at søkja.

**Starvið**
Trivnaðarleiðarin skal m.a. tryggja at økini: børn og ung, frítíð og mentan, heilsa og trivnaður og eldraøkið verða samskipað og rikin so skilagott sum til ber.
Tann 1. januar 2009 yvirtekur Eysturkommuna barnaverndartænastuna.

Í kommununi verður eitt leiðslutoymi og í leiðslutoyminum verða kommunustjóri, umsitingarleiðari, tekniskur leiðari og trivnaðarleiðari. Sostatt verður trivnaðarleiðarin partur av leiðsluni í Eysturkommunu.

Tú verður sjálv/ur í stóran mun við til at skapa starvið og menna nýggju Trivnaðardeildina saman við leiðslutoyminum og starvsfólkunum.

**Høvuðsuppgávurnar hjá trivnaðarleiðaranum eru m.a. at:**
- hava sum høvuðsuppgávu at taka sær av stovnum og uppgávum, sum hoyra til trivnaðarøkið
- hava ábyrgdina av dagligu leiðsluni, rakstraruppgávum og menningaruppgávum innan trivnaðarøkið
- tryggja at málsviðgerðin í trivnaðardeldini verður útint so skilagott sum til ber sambært galdandi lóggávu
- ráðgeva og vegleiða í trivnaðarspurningum
- fremja skilagott samstarv og samskifti við allar áhugabólkar

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a. at tú:
- hevur viðkomandi útbúgving og royndir
- ert før/ur fyri at skapa samskipandi karmar innan trivnaðarøkið
- hevur leiðsluroyndir og ert før/ur fyri at samansjóða og skapa trivnað
- ert tænastusinnað/ur, fyrikomandi og hevur góð evni og vilja til at samstarva
- ert strukturerað/ur, og hevur umsitingarligar førleikar

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett frá 1. desember 2008 og lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag ella eftir nærri avtalu.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. og øðrum viðkomandi skjølum skulu sendast til:

Eysturkommunu
Postboks 30
512 Norðragøta

ella til t-post: eystur@eystur.fo

Umsóknin skal verða Eysturkommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 6. oktober 2008 kl. 12.00.

**Vilt tú hava fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Erik Lervig, kommunustjóra, á tlf.: 771016. Víst verður eisini til heimasíðurnar hjá verandi kommunum: www.leirvik.fo og www.gota.fo.**

Eysturkommuna hevur 9 kommunustýrislimir, og høvuðsuppgávurnar eru at: virka sambært galdandi lóggávu, gerast betur før fyri at veita borgarunum eina góða tænastu, samskipa umsitingina og raksturin hjá kommununi, verða betur før fyri at taka ímóti nýggjum avbjóðingum í framtíðini, samskipa íløgurnar, skapa betri karmar fyri øktum virksemi í økinum og menna samstarvið við grannakommunurnar.

Í Eysturkommunu eru 1963 borgarar, og starvsfólkatalið í kommununi er 128. Harumframt eru hesir stovnar o.t. knýtt at kommununi: skúlar, tónlistaskúlar, kvøldskúlar, bókasøvn, frítíðarskúlar, svimjihyljar, dagrøktir, barnagarðar, frítíðaransingar, læknamiðstøð, heilsusjúkrasystir, tannlæknar, sløkkilið, eldrasambýlir, dagtilhald og undirhús. Kommunan hevur eisini kommunalt samstarv við aðrar kommunur og myndugleikar.


**Mándag, týsdag og mikudag Kl 17-18**

**22. - 24. september verða**

# BARNAMØTIR

**í Hebron á Argjum**

**Har verður:**
- nógvur sangur
- søgur um kongar í bibliuni
- drama
- og mangt annað





**WWW.HEBRON.FO**
**TRAÐAGØTA 57 • ARGIR**